VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Lot til andøvsgul av útsynningi ella av ymsum ættum og regn av og á . Hitin millum 7 og 10 stig.



Veðrið hósdagin:
Lot til andøvsgul av suðri, seinnapartin upp í ein strúk av útsynningi, Regn av og á og hitin millum 8 og 11 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og útsynningi og ælingur, men onkur sólglotti. Hitin millum 7 og 10 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi, sunnudagin hækkar hann upp í útnyrðing. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 5 og 9 stig.

Trotið á arbeiðsmegi størsta avbjóðingin

Tey næstu árini verður stórt trot á arbeiðsmegi í Danmark, og tað er tann størsta avbjóðingin hjá samfelagnum, segði Anders Fogh Rasmussen í setanarrøðu síni fyrrapartin

FÓLKATINGIÐ
Árni Joensen
arni@sosialurin.fo

Í røðuni nevndi Anders Fogh Rasmussen, at í vár vóru 58.000 ósett størv í teirri privatu vinnuni í Danmark. Harafturat eru nógv almenn størv ósett.

Forsætisráðharrin segði, at uppgávan at útvega ta neyðugu arbeiðsmegina er tann størsta avbjóðingin hjá stjórnini og Fólkatinginum.

Hann segði, at stjórnin hevur lagt eina ætlan um at útvega meiri arbeiðsmegi. Ein partur av loysnini er at fáa fólk at verða verandi á arbeiðsmarknaðinum, og í tí sambandi ætlar stjórnin at geva teimum, sum eru farin um tey 64, ein serligan skattafyrimun.

Forsætisráðharrin ásannaði, at tað verður eisini neyðugt at fáa meiri útlendska arbeiðsmegi til Danmarkar.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	0
Nuuk	1
Qaqortoq	4
Ammassalik	2
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	7
Seyðisfjørður	6
Tórshavn	8
Lerwick	11
Aberdeen	14
London	19
Tromsø	--
Bergen	9
Oslo	--
Stokkhólm	16
Keypmannah.	17
Helsinki	11
Moskva	16
Berlin	19
Warzawa	19
Kiev	16
Bukarest	18
Paris	18
Madrid	25
Róm	24
Malorca	25
Athen	22
Malta	25
Tunis	27
Beijing	28
New Dehli	34
Bangkok	33
Jakarta	32
Sydney	18
New York	21
Miami	31
Los Angeles	19
Meksikobýur	--
Panama	--
La Paz	12
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	20

LUFTTRÝSTIÐ

Í gjár:
Eitt lágtrýst, 984 hPa. vestan fyri Ísland fer í landnyrðing og kuldabrúgvin vestan fyri Føroyar fer eystureftir.



Í dag:
Lágtrýstið við Írland fer spakul.iga norðureftir og hitabrúgvin sunnan fyri Føroyar verður yvir Føroyum mikukvøldið.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 01/10 kl. 06^{00} – 02/10. 06^{00}. Hitin í gjár: 9,5°
Minsti hiti máldur í oktober: -4,0° - Mesti hiti máldur í oktober: 18,4°

AVFALLIÐ



Avfallið: 7,0 mm – mált frá 01/10 kl. 06^{00}– 02/10 kl. 06^{00}
Avfallið higartil í oktober: 0,0 mm

Tiltøk í Miðlahúsinum

5. oktober
Vencil

9. oktober
HUXA - kjakfundur

10. oktober
Sinnisbati

24. oktober
Demokratia

25. oktober
Føroyskt Lógarrit

FØROYABANKI
stuðlar tiltøkum í Miðlahúsinum

VESTFALLSKYRRINDI

26. september Fullmáni
28. september Mánin næstur jørðini
3. oktober Seinna kvarter

Kelda: Almanakkin 2007

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
2 . okt.	11.54	-	10.54	-	11.09	-	01.24	13.54	02.24	14.54	10.09	23.15	09.09	22.15	-	12.09	00.39	13.09	11.39	-	00.24	12.54
3 . okt.	01.00	13.20	00.00	12.20	00.15	12.35	03.00	15.20	04.00	16.20	11.35	-	10.35	23.39	01.15	13.35	02.15	14.35	00.45	13.05	02.00	14.20
4 . okt.	02.24	14.43	01.24	13.43	01.39	13.58	04.24	16.43	05.24	17.43	00.39	12.58	11.58	-	02.39	14.58	03.39	15.58	02.09	14.28	03.24	15.43
5 . okt.	03.09	15.36	02.09	14.36	02.24	14.51	05.09	17.36	06.09	18.36	01.24	13.51	00.24	12.51	03.24	15.51	04.24	16.51	02.54	15.21	04.09	16.36
6 . okt.	04.00	16.24	03.00	15.24	03.15	15.39	06.00	18.24	07.00	19.24	02.15	14.39	01.15	13.39	04.15	16.39	05.15	17.39	03.45	16.09	05.00	17.24

Lesið Sosialin -tað loysir seg